# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Fyri 20 árum síðan:

## 50 ára hátíðarhald

Fyri 20 árum síðan, í 1990, hittist ein realskúlaflokkur frá 1940 til 50 ára hátíðarhald í Hornahúsunum í Havn.

Næmingarnir eru f.v.: Helena Dal-Christiansen (Poulsen), Dánjal Magnussen, Oluf Simonsen, Margit Jacobsen (við Rætt), Eiler Egholm, Ingibjørg Jacobsen (Johannesen), Ella Ellendesen (Petersen), Poula Jacobsen (Christiansen), Bodil Guttesen (Nielsen), Karolina Hansen (Petersen), Anna Jacobsen (Long), Oda Gaard Hansen (Olsen), Gudny Jacobsen (Rubeksen) og Ebba Andreassen (Winther).

Um onkur hevur hug at ogna sær myndina, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr. 380).

*Myndaeigari: Helena Poulsen*



## Andlát og jarðarferðir

**Hans Anton Thomsen** fer til gravar leygardagin kl. 13 úr Glyvra kirkju. Tey, sum ynskja at senda blómur ella krans, kunna ístaðin lata eina gávu til børnini. Konta í Eik.

**Torkil Hovsdal, Hov,** andaðist á Eldrasambýlinum í Vági mikudagin, 80 ára gamal.

Kistan við **Knud Erik Andersen, Toftir**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni leygardagin kl. 14. Tey, ið ynskja at minnast Knud Erik, kunnu lata eina gávu til Føroya felag móti Krabbameini. Konta í peningastovnunum.

**Jógvan Evald Jacobsen, Leirvík**, andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikudagin, 86 ára gamal. Bønarhald verður í kapellinum á sjúkrahúsinum fríggjadagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Lerivíkar kirkju leygardagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Jógvan Evald, kunnu lata Sambýlinum Giljagarður eina gávu. Konta í peningastovnunum.

## Merkisdagar

**Diamantbrúdleyp**
Tann 28. januar kunnu hjúnini Diana og Alfred Klein, Fuglafirði, halda diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 30. januar, kl. 16, har øll eru vælkomin. Fólk verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 23. januar á tlf. 444092.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 26. febr. hava hjúnini Heinina og Sigurd Gaard Hansen diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin tann 27. feb. í Royndarhúsinum í Nólsoy. Tey, sum vilja gleðast saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 327145 ella 527145 innan 7. febr.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. februar hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. februar frá klokkan 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 16. jan kl. 13 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Jóhanna Dahl Sørensen Norðdepil og Rasmus Magnusson Innan Glyvur. Eftir vígsluna verður receptión á Klaksvíkar Sjómansskúla frá kl 14-17, har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum í Árnafirði kl. 19.

**Brúdleyp**
Leygardagin 23. januar kl. 15 giftast í Hoyvíkar Kirkju Tóra Simonsen, Saltangará, og Herbert í Lon Jacobsen, Hoyvík. Vælkomst verður heima við hús frá kl.19.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu, tá elskaði pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Einar Petersen**
Fuglafirði
vanliga nevndur Einar »Suðring«

andaðist og varð jarðaður.

Takk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.
Ein serlig tøkk til Eysturoyar røktar- & ellisheim fyri ta tíð, hann var har.

*Vinarliga*
**Børnini við familju**